


# H.N.J. – bókahandil, mentan og søga

**Vit hava í hesi røð havt tvær greinir um H.N. Jacobsen og hansara ættarfólk. Í seinasta parti varð greitt frá Sigrid, dóttir H.N. Jacobsen, og mann hennara Poul Niclasen, sum tóku við bókahandlinum eftir tann gamla**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo


Sigrid og Poul áttu fýra børn. Elst var Johanna Maria (1892-1918). Hon doyði ung av tuberklum og er jarðað saman við restini av ættini í gamla kirkjugarði. Síðan var tað Susanna Cathrina (1893-1949), sum giftist við Herluf Lützen (1887-1934), hann var beiggi Valdemar. Tey bæði vóru umrødd í Miðvikuni í samband Egil Djurhuus og tey verða eisini umrødd í hesi røð.

Teir, sum tóku yvir bókhandilin eftir Sigrid, vóru synirnir Hans Nicolai (1894-1970) giftur við Ellen Kate Bærentsen f. 1902, og Sigurd (1896-1949). Sigurd var í nógv ár ímyndin av bókahandlinum. Hann var kendur fyri at vera blíður og fyrikomandi.

Hann plagdi at síggjast á rossabakki. Tað lá væl fyri at hava ross, tí H.N. Jacobsen átti stóra trøð. Sigurd doyði knapliga í Keypmannahavn, bert 63 ára gamal. Ein kendur maður seinnu tíðini í bókahandlinum var Karl Niclasen, sum man hava verið skyldmaður Poul Niclasen.

Bókahandilin man hava verið eitt gott arbeiðspláss, tí her hava fólk ofta støðast í nógv ár.

Tey av Jacobsenættini, sum stóðu fyri bókahandilin, fingu ikki eftirkomarar. Tí er H.N. Jacobsens Bókahandil í dag rikin av einum sjálveigandi grunni.

## Jakob Jakobsen

Men fyri at koma aftur til H.N. Jacobsen átti hann tvey onnur børn enn Sigrid. Hetta var Anna, sum giftist í Danmark og fekk navnið Horsbøl, og Jakob Jakobsen, sum var kendur sum málgranskari.

Hóast tey bæði eru jarðað í Keypmannahavn, so verða tey tikin við í umrøðuni av hesi áhugaverdu ætt.

Jakob Jakobsen varð føddur í Havn 22. februar 1864. Hann fór í realskúlan í Havn og sýndi tíðliga, at hann hava sera góðar gávur at læra mál. Trettan ára gamal fór hann til Danmarkar og varð studentur frá Herlufsholm í 1883. Í 1891 tók hann embætisprógv við donskum máli sum høvuðsgrein og fronskum og latín sum hjágreinir.

Í 1889 verður Føringafelag stovnað sum úrslit av jólafundinum í 1888. Í felagnum skjýtur Jakob Jakobsen upp, at føroyskt skal stavast sum tað verður tosað, mótsett málløruni hjá Hammershaimb, sum hann annars hevði hjálpt við Antologiini.

Í 1893 er tað, at Jakob bjargar leivdunum av tí gamla norrøna málinum í Hetlandi, tá ið hann miðvíst vitjar allar oyggjarnar og skrivar niður alt hann finnur av orðum. Hetta arbeiðið verður liðugt í 1905, tá ið hann hevur niðurskrivað 10.000 orð og harvið eisini bjargað teimum frá gloymsku. Enn hava teir í Hetlandi bæði orð og staðarnøvn á norrønum.

Í 1909 ger Jacob eitt líknandi arbeiði á Orknoyggjum. Her finnur hann eisini mong norrøn orð men ikki so mong sum í Hetlandi.

Í 1898 byrjar Jakob at útgeva “Sagnir og Ævintýr.” Hetta endar í 1901.

Í 1901 vinnur rættskrivingin hjá Hammershaimb móti henni hjá Jakob Jakobsen.

Jakob Jakobsen er fyrsti føroyingur, sum fekk doktaraheiti. Tað fekk hann í 1897 fyri verkið Det norrøne sprog paa Shetlandsøerne.

## Anna Horsbøl

Anna var fødd 15. juli 1856. Hon doyði í oktober 1940, 84 ára gomul. M.A. Jacobsen skrivaði hesi minningarorð:

Tað frættist nú ein dagin í danska útvarpinum, at frú Anna Horsbøl var deyð.

Hon var borin í heim í Havn í 1856. Foreldur hennara vóru H. N. Jacobsen, bókahandlari og Johanna Maria, fødd Hansdóttir, úr Trøðum á Sandi.

Tey vóru trý systkin: Elst var Sigrid, gift við Poul Niclasen, bókahandlara og yngstur var beiggin Jakob Jakobsen, doktari.

Frú Horsbøl livdi meginpartin av ævi síni í Keypmannahavn, har hon hevði sítt yrki sum lærarinna. Hon hevði bústað sín á Grundtvigsvegi nr. 5, og mong av tí eldra ættarliðnum vilja við takksemi minnast á hetta føroyska heimið í stórbýnum.

Bróður hennara, hin navnframi Jakob Jakobsen, doktari, búði hjá systir síni, og um samveru teirra skrivar Maria Mikkelsen í fororðinum til Sagnir og Ævintýr, Tórshavn 1925 hesi vøkru og sonnu orð:

Eingin kundi vera betri við hann enn systirin, sum eisini dugdi at sleppa honum undan at hugsa um tað, sum er neyðugt hvønn yrkadag, men sum hann mest vildi følt sum nakað, ið tarnaði honum. Og aftaná, at hann var farin, gjørdi systirin hvat gerast kundi fyri at goyma og varðveita tað, ið eftir hann lá og føra hansara arbeiði víðari. Í stórum sum smáum útinti hon her eitt kærleikaverk.

Fyri frú Horsbøll var tað ógvuliga hugstoytt, at beiggin skuldi falla frá í so ungum aldri. Hann doyði 13. august 1918, 54 ára gamal. Høvuðsvirki hansara hin hetlendska orðabókin var tá liðug at kalla (fullprentað var hon í 1921).

Men kærleikin til beiggjan, og minnið um vísindaliga arbeiði hansara, sum hon til fulnar dugdi at meta, gav frú Horsbøll eina lívsuppgávu, sum stilti saknin og sorgina.

Og tó at hon var 62 ár, tá ið beiggin doyði, hevði hon fulla arbeiðsmegi og so stórt áræði, at hon fór undir uppgávuna alt í einum. Hon visti, at Jakob Jakobsen altíð hevði ynskt eftir, at tann hetlendska orðabókin (hetlendsk við danskari týðing) skuldi koma út í enskari útgávu, t.e. við enskum orðatýðingum. Hon fór tí alt fyri eitt undir at fyrireika eina slíka útgávu. Og tað eydnaðist henni at fullføra hetta arbeiði, sum ber vitni um hennara málsligu gávur og vísindaliga hegni. Útgáva hennara fyriliggur í tveimum stórum bindum: An etymological dictionary of the Norn language in Shetland. By Jakob Jakobsen 1-2. London. Copenhagen 1928-32.

Tá ið hon hevði lagt hetta verk úr hondum, fór hon undir at týða doktararitgerðina hjá beiggjanum Det Norrøne Sprog paa Shetland. Hvussu langt hon var komin við hesum arbeiði, tá ið hon doyði, er mær ókunnugt. Men tað skal ikki undra meg, um tað eisini eydnaðist henni at fullføra hesa útgávu.

Nú er hon farin, henda hugprúða kvinnan, sum vígdi lív sítt til tað arbeiði, sum er til heiðurs fyri beiggjans minni og eisini fyri tað land, sum fostraði hann.

Føroyingar vilja minnast hana við takksemi og hávirðing.

Sum tað skilst átti Anna ikki børn.




HANNA NICLASSEN
F. 13. FEBRUAR 1892
D. 21. MARTS 1916

SIGURD NICLASSEN
F. 22. MARTS 1896
D. 2. JUNI 1949




*Hanna doyði bert 26 ára gomul í 1918. Hon ferðaðist víða um heim og lat eisini frætta frá sær. Hetta fara vit at hava meira um seinni. Ebbe Kornerup málaði hendan málning í 1918, sama ár sum Anna doyði. Ogn: Listasavnið*



*Sigurd gjørdist bert 53 ára gamal*



*Johanna Maria og H.N. Jacobsen saman við sínum børnum. F.v. Sigrid, Jakob og Anna*

**Komandi partur**

Í komandi parti verður greitt frá Joen Peter Evensen og hansara ætt